# BÝRÁÐSFUNDUR

**Dagfesting:** 31.10.2016 kl. 19:00

Nevndarlimir:: Dennis Holm
Eydis Kjærbo
Anna Brattaberg Samuelsen
Conrad Gaard Joensen
Dánjal Bjarkhamar
Heri Hjelm
Poul W. Augustinussen
Tórður Poulsen
Eyðbritt Krosslá

Nevndarskrivari: Petry Joensen


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 89/16 | 16/00251-3 | Brandstøðin, eykajáttan fyri 2016 | 2 |
| 90/16 | 16/00261-2 | Eykajáttan til gl svimjihyl | 3 |
| 91/16 | 16/00281-2 | Eykajáttan 2016, Eikilund | 4 |
| 92/16 | 16/00267-2 | Vágs Timburhandil_Fyrispurningur um keyp á Oyrinum | 5 |
| 93/16 | 16/00280-3 | Ígongdsetanarstuðul til endurskoðan | 6 |
| 94/16 | 16/00121-7 | Leigusáttmálar fyri smáttur við Laksá | 7 |
| 95/16 | 16/00296-2 | Eldrabústaðir sum felags ogn | 10 |


Borgarstjórin biður um at fáa mál 16/00296 á skránna til býráðsfundin í kvøld. Hetta játtaði býráðið einmælt.

## 89/16 Brandstøðin, eykajáttan fyri 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.09.2016 | 98/16 | 16/00251-3 |
| 2 Vágs Býráð | 03.10.2016 | 78/16 | 16/00251-3 |
| 3 Vágs Býráð | 31.10.2016 | 89/16 | 16/00251-3 |

Út frá bókaðum tølum fyrstu 7 mðr í 2016 kemur Brandstøðin at hava meirnýtslu í mun til játtanina. Ein partur av frágreiðingini er klárgerð av neystinum til bjargingarbátin.

Fíggjarleiðarin mælir til, at kr. 150.000 verða játtaðar av innistandandi. Um hetta verður játtað skal málið beinast í Býráðið og hava 2 viðgerðir har.

**Fíggjarnevndin 27. september 2016:**
Einmælt samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við hesum.

**Vágs Býráð 03. oktober 2016:**
Einmælt samtykt til fyrru viðgerð.

**Vágs Býráð 31. oktober 2016:**
Einmælt samtykt til seinnu viðgerð.

**90/16 Eykajáttan til gl svimjihyl**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 19.09.2016 | 92/16 | 16/00261-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.09.2016 | 99/16 | 16/00261-2 |
| 3 Vágs Býráð | 03.10.2016 | 79/16 | 16/00261-2 |
| 4 Vágs Býráð | 31.10.2016 | 90/16 | 16/00261-2 |

Onki var sett av á upprunaligu FÆ2016 til svimjihylin í skúlanum, tí Páls Høll opnaði í oktober 2015. Men lønaruppgerð til starvsfólkini ger, at VK eisini hevur havt útreiðslur í ár av gl. svimjihyli. Bókhaldið metir, at hetta eru síðstu útreiðslurnar av gl svimjihyli ella í hvussu er vita vit ikki um annað.

Fíggjarleiðarin mælir til, at játtað kr. 70.000 av innistandandi.

**Mentanarnevndin 19. september 2016:**
MN tekur undir við fíggjarleiðaranum og beinir málið í FN.

**Fíggjarnevndin 27. september 2016:**
Einmælt samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við hesum.

**Vágs Býráð 03. oktober 2016:**
Einmælt samtykt til fyrru viðgerð.

**Vágs Býráð 31. oktober 2016:**
Einmælt samtykt til seinnu viðgerð.

# 91/16 Eykajáttan 2016, Eikilund

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 17.10.2016 | 98/16 | 16/00281-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.10.2016 | 114/16 | 16/00281-2 |
| 3 Vágs Býráð | 31.10.2016 | 91/16 | 16/00281-2 |

Játtanin hjá barnagarðinum fer ikki at halda. Serliga eru tað lønirnar, sum gera tað. Tað eru fleiri ymsar orsøkir til tað. Fyrst og fremst hava vit undirmett veruliga lønarkostnaðin í FÆ2016. Lønirnar kostaðu beint yvir 8 mió í 2015, men í FÆ16 hava vit bara avsett 7.954 mió, altso minni enn staðfesta kostnaðin árið fyri. Tað er ikki serliga vanligt at lønarkostnaðir minka við sama ella betri tænastustøðið.
Løgtingið hækkaði arbeiðsmarknaðargjøldini eftir at okkara FÆ16 var gjørd, og tí er tann hækkaði kostnaðurin ikki við. Eisini bleiv nýggjur sáttmáli hjá pedagogfelagnum undirskrivaður í jan 2016 (eftir okkara FÆ16 var endaligt). Hetta er heldur ikki innarbeitt, og tá kommunan skal betala lønarhækkan aftur til okt 2015, so ávirkar hetta eisini útreiðslurnar skeiva vegin.
Í FÆ16 eru "inntøkurnar" av stuðlum mettar til 75.000 kr/mðr, men tað vísur seg at hetta verður nakað lægri.

Mælt verður til at játtað kr 400.000 meir til lønir og at lækka inntøkurnar við kr 50.000. Sostatt skal tað játtast kr 450.000 av innistandandi.

Málið skal eisini fyri Fíggjarnevndina og Býráðið (2 viðgerðir).

**Mentanarnevndin 17. oktober 2016:**
MN játtar 450.000,- av innistandandi til Eikilund. Og beinir málið í FN.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við Mentunarnevndini og beina málið í býráðið.

**Vágs Býráð 31. oktober 2016:**
Einmælt samtykt til fyrru viðgerð.

## 92/16 Vágs Timburhandil_Fyrispurningur um keyp á Oyrinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.09.2016 | 96/16 | 16/00267-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 17.10.2016 | 56/16 | 16/00267-2 |
| 3 Havnanevndin | 17.10.2016 | 31/16 | 16/00267-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 24.10.2016 | 117/16 | 16/00267-2 |
| 5 Vágs Býráð | 31.10.2016 | 92/16 | 16/00267-2 |

Vágs kommuna hevur 20. september 2016 móttikið skriv frá Vágs Timburhandli.
Vágs Timburhandil heitir á Vágs Kommunu um, at selja teimum økið vestan fyri 597b á Oyrunum á uml. 1400 fermetrar. Somuleiðis verður søkt um at keypa uml. 1.000 fermetrar eystan fyri Vágs Timburhandil.
Ætlanin er at byggja eina framleiðsluhøll á øki við 597b og hitt øki er ætla goymslu (útbygging av verandi bygningi á 21 * 20 m).

**Fíggjarnevndin 27. september 2016:**
Einmælt samtykt at beina málið í nevnd. Eitt slíkt mál eigur at fáa eina grundiga nevndar viðgerð áðrenn býráðið verður at taka støðu.

**12. oktober 2016:**

**Tekniska nevnd 17. oktober 2016:**
Einmalt samtikt at máli verður tikið av skrá, tí at ynskið er at máli fyrst verður viðgjørt í Havnanevndini.

**Havnanevndin 17. oktober 2016:**
Sambært kunngerð nr. 22 frá ár 2000 um sølu av kommunalari ogn, skal søla omanfyri 300m2 lýsast í almennari sølu. Tó kann landsstýrismaðurin geva undantøk.
Einmælt samtykt at Vágs kommuna søkir landsstýrismannin um undantaksloyvi.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við Havnanevndini.

**Vágs Býráð 31. oktober 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við havnanevndini.
Treytin fyri søluni er, at ætlaði bygningurin verður bygdur á matr. nr. 597b.

## 93/16 Ígongdsetanarstuðul til endurskoðan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.10.2016 | 113/16 | 16/00280-3 |
| 2 Vágs Býráð | 31.10.2016 | 93/16 | 16/00280-3 |

Borgarstjórin ynskir at Vágs kommuna tekur upp til endurskoðan Ígongdsetanarstuðul hjá Vágs kommunu. Fíggjarleiðarin hevur gjørt viðmerkingar í málið.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2016:**
Einmælt samtykt at broyta skipanina soleiðis at stuðulin hækkar upp í 20.000,00 kr. til einstaka umsøkjarin. Samstundis verður reglugerðin endurskoða og løgd fyri býráðið.

**Vágs Býráð 31. oktober 2016:**
Einmælt samtykt at hækka stuðulin upp í 20.000,00 kr., og at endurskoða reglugerðini fyrst í komandi valskeiðið.

# 94/16 Leigusáttmálar fyri smáttur við Laksá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 36/16 | 16/00121-7 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 73/16 | 16/00121-7 |
| 3 Vágs Býráð | 13.07.2016 | 59/16 | 16/00121-7 |
| 4 Tekniska nevnd | 15.08.2016 | 43/16 | 16/00121-7 |
| 5 Fíggjarnevndin | 23.08.2016 | 89/16 | 16/00121-7 |
| 6 Vágs Býráð | 29.08.2016 | 72/16 | 16/00121-7 |
| 7 Fíggjarnevndin | 24.10.2016 | 111/16 | 16/00121-7 |
| 8 Vágs Býráð | 31.10.2016 | 94/16 | 16/00121-7 |

Peningastovnar sum skulu inn at fíggjar onkrar av gjørdu smáttununum hava vent sær til kommununa og víst á, at fyri at teir kunnu tinglýsa sítt pant í ognini, má ognin hava egið matrikulkort.
Eisini ásetur matrikullógin §15 at eigindómur ella ómatrikuleraður lutur kann ikki avhendast ella pantsetast fyri seg ella verða latin øðrum til brúks longur enn 10 ár, uttan so at matrikulmyndugleikin góðkennir sundurbýtið, so hesin partur verður frábýttir við egnum matr. nr.

Sambært Matrikulstovuni er møguligt at býta matrikulnummar 490d í 10 lutir (Matrikulkort), hetta kann gerast eftir at hvør smáttan hevur fingið serstakt húsanummar.

Viðfest er yvirlit yvir leigarar av luti á matr. nr. 490d, skotið verður upp at kommunan broytir øll leigumál til 10 ára longd og leggur allar leigusáttmálar fyri á fyrst komandi býráðsfundi.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við at fremja matrikuleringina, men hetta er ikki í áhuga fyri kommununa og verða eigarar sjálvir at gjalda fyri matrikuleringina.
Mælt verður til at leggja leigusáttmálarnar fyri býráðið á komandi fundi og broyta leigutíðina til 10 ár.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**Vágs Býráð 13. juli 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**12. august 2016:**
Matrikuleringin er send Matrukkilstovuni, men er enn ikki endaliga komin uppá pláss.
Uppskot er gjørt til leigusáttmálar og leigarar eru Kráavegur 10F Kári og Leona Nilsen, Kráavegur 10G Hjalmar og Kristianna Sjóvará, Kráavegur 10H Spf Marr & Co. v/ Andras Marr Poulsen og Kráavegur 10K,L,A,B,C,D,E Spf Við Laksá.
Bert Kári og Leona hava higartil goldið Vágs kommunu fyri útlegg. Mælt verður til at góðkenna leigusáttmálarnar, men at teir ikki fáa gildið (verða undirskrivaðir) fyrr enn Vágs kommuna hevur fingið goldið fyri alt útlegg.

**Tekniska nevnd 15. august 2016:**
Samtykt er at mæla til at góðkenna gjørdar leigusáttmálar við teirru treyt, at ánarar av hvørjari hyttu sær hava avgreitt síni fíggjarviðuskiftir við Vágs Kommunu, áðrenn leigusáttmálanir verða endaliga undirskrivaðir.

**Nýtt í málinum 18. august 2016:**
Fíggjarleiðarin upplýsir at bara 3 eigarar hava goldið leigu á kr. 18.000 (Kári og Leona, Hjalmar & Kristianna og Marr & Co), sum er leigukostnaður fyrsta árið. Sp/f Laksá hevur enn ikki goldið leiguna fyri fyrsta árið, ið er 7 smáttur x 18.000 (íalt 126.000 kr).
Sambært Borgarstjóranum skal Suðursmíð við Hjalmar Magnussen (hava bygt smátturnar), gjalda VK fyri rest útlegg, ið hevur verið av smáttunum. Fram til endan av juni 2016 hevur VK lagt út kr 556.000, og skyldar Suðursmíð sostatt hesa upphædd minus 10 smáttir x 18.000 kr.
Bókhaldið hevur sent nógv brøv viðv skuldini, og havt fundir og nógv annað samskifti við bæði Suðursmíð sp/f og Við Laksá sp/f uttan at fáa pengarnar aftur.

**Fíggjarnevndin 23. august 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd. Øll skuld skal verða avgreidd við Vágs kommunu áðrenn leigusáttmálar verða undirskrivaðir.
Málið verður lagt fyri býráðið á komandi fundi.

**Vágs Býráð 29. august 2016:**
Samtykt við 6 atkvøðum fyri at taka undir við fíggjarnevndini. Heri Hjelm atkvøddi ikki.

**20 oktober 2016 :**
Borgarstjórin hevur biði umsitingina koyra hetta málið á skránna til komandi fíggjarnevndarfund.

Alt útlegg hjá VK fram til endan av 2015 er fakturera til eigarar og byggifyritøkuna. Harumframt hevur VK brúkt uml 98.000 kr í 2016 til gøtuna framvið smáttunum o.a., sum ikki er fakturera enn. Býráðið hevur í 2016 játtað 100.000 kr í eykajáttan, men av teimum eru 50.000 kr oyramerktar til p-plássið hinumegin Kráarveg, sum ikki er gjørt enn. Sostatt eigur VK 126 tkr hjá Við Laksá spf, 288 tkr hjá Suðursmíð og aðrar 48 tkr, sum enn ikki eru fakturераðar (462 tkr íalt).

Tað er ongin ivi um, at áðrenn farið var í holt við smátturnar bleiv tað ferð eftir ferð upplýst fyri VK, at hetta kom ikki at kosta VK eina krónu, og at VK skuldi heldur ikki leggja nakrar pengar út. VK hevur sum er goldið 50 tkr fyri gøtuna og 462 tkr eru lagdar út, men eru ikki goldnar aftur enn. Og tá p-plássið skal gerast skal VK helst eisini betala fyri tað.

Umsitingin mælir frá, at broyta samtykt Býráðsins frá 29.08.2016, tí umsitingin metir váðan hjá VK fyri at missa pengar hækkar um Suðursmíð stendur sum einsamallur skuldari.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2016:**
Einmælt samtykti, at útseta málið til ein eyka fíggjarnevndarfund sum verður seinni í vikuni.
Fíggjarnevndin ynskir at fáa kannað málið eitt sindur meira gjølla.

**Vágs Býráð 31. oktober 2016:**
Samtykt við 8 atkvøðum fyri at undirskriva leigusáttmálarnir tá Sp/f Laksá hevur goldið útistandandi fyri grundleiguna. Síðani verður Suðursmíð at gjalda sambært fyriliggjandi avtalu (sí teldupost frá 17/10-2016).
Heri Hjelm atkvøddi ikki.

## 95/16 Eldrabústaðir sum felags ogn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 31.10.2016 | 95/16 | 16/00296-2 |

# Eldrabústaðir sum felagsogn og keyp av Sambýlinum við Sílánna

**Grundað á stýrisfundin í Bú- og Heimatænastan í Suðuroy 24. okt. 2016**

*Dagført 28. Okt. 2016 eftir gjøgnumgongd av tølum frá BHS og Fíggjarmálaráðnum, og síðani samtykt á stýrisfundinum 28. Okt. 2016.*

*Á fundi vóru:*
*Mikkjal Sørensen, Eyðdis Ellendersen, Kristin Michelsen, Marjun Olsen, Dennis Holm, Eyðis Kjærbo, Trygvi Gudmundarsson, Eyðbjørn Thomsen, Delmar Tausen, og Anna Djurhuus (BHS).*

Á stýrisfundi í stýrinum fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy 24. oktober 2016 samtykti stýrið, at eldrabústaðirnar í Suðuroy: Ellis- og røktarheimið Hamragarður, Eldrasambýlið í Hvalba og Eldrasambýlið í Vági – skulu gerast ogn hjá Bú- og Heimatænastuni í Suðuroy. Stýrið samtykti harumframt at keypa Sambýlið við Sílánna á Tvøroyri frá privatum eigara.

*Tølini skulu gjøgnumgangast av grannskoðara, áðrenn avtalur verða endaliga avgreiddar. Eisini skal støða takast til spurningin um prístalsregulering / regulering í mun til CIBOR ella CITA rentuni.*

*Á stýrisfundi 28. Okt. 2016 varð hetta uppritið gjøgnumgingið og stýrið er samt um at senda uppritið til kommunustýrini við tilmælið um at taka undir við innihaldinum í uppritinum.*

**Vágs Býráð 31. oktober 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskotið.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Dennis Holm | Eydis Kjærbo | Anna Brattaberg Samuelsen |
| Conrad Gaard Joensen | Dánjal Bjarkhamar | Heri Hjelm |
| Poul W. Augustinussen | Tórður Poulsen | Eyðbritt Krosslá |